# Tvingsilssøla yvir útróðrarbát

Eftir áheitan frá Jóhan J. Lamhauge, advokati, Advokatfelagið við Strond 4, Yviri við Strond 4, 100 Tórshavn, tlf. 311260, vegna veð-og úttøkuhavara, verður hildin tvingsilssøla

**fríggjadagin, tann 3. februar 2006, kl. 13.00,**

á Dómaraskrivstovuni í Tórshavn, C. Pløyensgøta 1, 100 Tórshavn, (AS 2-34/2005) yvir útróðrarbátin

**"M/B Norðoyingur,"**

ið Sp/f Norðoyggjafelagið er eigari av. Báturin hevur kenningsstavir OW 2073, og havnakenningsstavir KG 56. Báturin hevur fiskiloyvi í bólki 4A, men dagatalið er avmarkað til 0,9 fiskidøgum.

Báturin er smíðaður úr eik, bygdur í Rødvig í Danmark í 1973 og heimahoyrandi í Klaksvík. Báturin er merktur 21.2 brt.

Báturin verður seldur við tilhoyrandi útgerð, so sum tilhoyrandi nautiskari útgerð, línuspæli og 40 stk. línum v.m.

Fyrireikandi fundur verður hildin á Dómaraskrivstovuni **fríggjadagin, tann 20. januar 2006, kl. 13.00.**

Einhvør, ið heldur seg hava rættindi yvir bátinum ella møguligari útgerð, verður biðin um at møta.

Avrit av uppskoti til tvingsilssølutreytir kunnu fáast við at venda sær til advokat Jóhan J. Lamhauge.

Skjøl í sambandi við tvingsilssøluna liggja frammi til skoðan á Dómaraskrivstovuni, C. Pløyensgøta 1, 100 Tórshavn.

Føroya fútarættur, tann 14. desember 2005

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr. Sp/f 2724,** Sp/f Bragd, 700 Klaksvík.
**Stjórn:**
**Farin frá sum stjóri:** John Kári Jacobsen, 740 Hvannasund
**Innkomin sum stjóri:** Alexander Joensen, Rættargøta 16, 700 Klaksvík
**Partapeningur:** Viðtikið 29.12.2005 at lækka partapeningin við kr. 20.000,00 til kr. 80.000,00 til kurs 2.000, til útgjaldingar til partaeigarar, eftir at proklama er runnið.

*Skráseting Føroya*
*tann 11. januar 2006*

*Kristin Balle*

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr. Sp/f 2629,** Sp/f frá 4/4-62, 210 Sandur.
**Stjórn:**
**Farin frá sum stjóri:** Steintór Fagradal, 210 Sandur
**Innkomin sum stjóri:** Jacobina Elin Súna Fagradal, 210 Sandur

*Skráseting Føroya*
*tann 11. januar 2006*

*Kristin Balle*

KVARTETTIN *Vitin*



## Norðoyingar – komið og syngið við!

Leygarkvøldið 14. januar kl. 21.00,
skipar kvartettin Vitin í Betesda, Klaksvík fyri sangløtu í

## Ítróttarhøllini í Klaksvík

Á skránni er: felagssangur – kvartettsangur – upplestur – leikur – tala
Aftaná verður bjóðað kaffi við onkrum afturvið

*Smakkið, og síggið, at HARRIN er góður! Sælur er tann maður, ið søkir sær skjól hjá Honum. Sálmur 34,9*

*Øll eru hjartaliga vælkomin*

VASTI 459010

## [ HØLI TIL LEIGU Í SKOPUN ]

Nýtt høli til leigu í Skopun í nýggjum og spennandi umhvørvi. Hølið er 50 m² og er inni í eini handilshøll, har matvøruhandil, frisør og gávubúð eisini búleikast.

Hevur tú hugsað um at lata ein handil ella tænastuvirksemi upp, so er hetta tín møguleiki at gera tað til veruleika.

***Handilshøllin "LONIN"***
***Fleiri tænastur á einum stað.***
***Góð parkeringsviðurskifti***
***Eitt hugnaligt og nýtt umhvørvi á bygd***

Hevur hetta tín áhuga, ring 281 620 ella 361 620 til Sámal Hanna og hoyr nærri.

Umsóknir verða at senda til:
Sámal Hanna og Kristu Lognberg
240 Skopun

## RØRSMIÐUR

Søkt verður eftir rørsmiðjum at byrja skjótast gjørligt.
Vit vænta at tú arbeiðir skjótt og væl, ert álítandi og førur at arbeiða sjálvstøðugt.
Umsókn við avriti av prógvum, vi mælum v.m. ver a at senda til:

Rør-tænastan
Postsmoga 1106
FO-110 Tórshavn

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Eyðfinn Hansen á tel 22 81 80



**rør**-*tænastan*
*Vatn-Hiti-Sanitet-Ventilatión*

**Suðuroyar Apotek**

**Nú hevur tú møguleika at vera við á einum skeiði fyri bólkar, har tú leggur av at roykja.**

Roykisteðg-skeiðið verður fyriskipað av roykiavvenjarum á Suðuroyar Apoteki og er skipað soleiðis:

Í hvørjum bólki verða uml. 8-10 luttakarar. Vit møtast 5 onskvøld yvir uml. 6 vikur og hvør kvøldfundur er uml. 2-3 tímar.

Byrjað verður onskvøldið 18. januar og síðani møtast vit hvørt onskvøld næstu vikurnar. Skeiðið endar onskvøldið 22. februar. Miðskeiðis í skeiðnum verður dagurin ásettur, tá ið tú skalt leggja av at roykja!

Kostnaðurin fyri skeiðið er 1000,- kr. og tilmelding fer fram á Suðuroyar Apoteki.

Hevur tú fyrispurningar hesum viðvíkjandi, kanst tú ringja á Suðuroyar Apotek og spyrja eftir einum roykiavvenjara.

**Suðuroyar Apotek**
800 Tvøroyri
Tlf. 371076

Lesið Sosialin - so eru tit við